


www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 09 - 2011

# Íslendingar umhugsa alment oljufelag

Tann 3. oktober fara íslendingar aftur at bjóða oljufeløgum at leita eftir olju og gassi á Drekaleiðini. Seinast var áhugin sera lítil, men eftir at Altingið fyri stuttum gjørdi tað heldur meiri einfalt hjá feløgum at taka lut í leiting og framleiðslu, eru vónir um, at heldur fleiri umsóknir fara at koma hesaferð. Spurningurin er, um eitt alment íslendskt felag fer at liggja framvið. Í hvussu er er ídnaðarmálaráðið í Reykjavík í ferð við at kanna, um tað almenna skal stovna eitt ríkisoljufelag. Ráðið hevur havt samband við fleiri partar fyri at kanna, hvat er rætt at gera, men endalig avgerð er ikki tikin, sigur íslendska útvarpið frá embætisfólki í ídnaðarmálaráðnum. Sum skilst er norska felagið Petoro ein fyrimynd, sum íslendingar hyggja eftir. Kann økja um áhugan Altjóða ráðgevarafyritøkan PricewaterhouseCoopers hevur kannað, hvat skal til fyri at stovna eitt tílíkt alment oljufelag, og sambært keldum í Reykjavík heldur fyritøkan huskotið um eitt ríkisoljufelag vera gott. "Tað er ikki neyðugt at uppfinna hjólið av nýggjum í hesum føri. Slík feløg hava roynst væl í londum, sum vit plaga at samanbera okkum við", sigur Halldór Þorkelsson hjá PricewaterhouseCoopers við íslendska útvarpið. Hann heldur, at eitt alment felag hevði økt áhugan fyri tí íslendska økinum. Ídnaðarmálaráðið sigur, at hóast hugskotið um eitt alment oljufelag ikki verður framt í verki, fer tað almenna at fáa ágóða av Drekaleiðini, um oilja ella gass verður funnið har, tí lógin tryggjar tí almenna millum annað skattainntøkur og framleiðslugjald.